# Stak-roydirnar vóru lógligar

**Eystari Landsrættur staðfesti í gjár, at hátturin, sum Fiskiveiðieftirlitið hevði nýtt til at gera stakroyndir av fiskiskapinum hjá línuskipinum Sigmund, vóru í lagi**

Leo Poulsen

Vit skrivaðu í mikudagsblaðnum um sakarmálið í Eystara Landsrætti, har P/F Eysturoy hevði kært ein dóm í Føroya Rætti inn fyri Eystara Landsrætt, um háttin hjá Fiskiveiðieftirlitinum at taka stakroyndir.

Sigmund kom inn á Toftir at landa ein átta daga langan túr vestan fyri Suðuroynna. Fiskiveiðieftirlitið kom umborð og tók tríggjar stakroyndir av veiðini sum allar vístu, at línubáturin hevði av nógvan ungfisk íblandaðan veiðini.

Stakroyndirnar vóru tiknar frá degi eitt og tvey, av degi trý og fýra og hin seinasta frá fýra teimum seinastu døgunum.

Úrslitið gjørdist, at Fiskiveiðieftirlitið tók fiskiloyvið frá Sigmundi í 14 dagar, men tað góðtók reiðaríið ikki og fór í Føroya Rætt við málinum. Har varð avgjørt, at skipið skuldi missa veiðiloyvið í 10 dagar.

Málið endaði so í Eystara Landsrætti, sum í gjár staðfesti dómin í Føroya Rætti. Teir tríggir landsrættardómararnir mettu, at stakroyndirnar vóru fult dekkandi, og at revsingin var passandi.

*Veitst tú eina søgu, send so SMS á 28 50 04*






# Misti koyrikortið uttan at føra bilin

**RÆTTARMÁL Maðurin, sum í Føroya Rætti varð dømdur at missa koyrikotið fyri at órógva bilførarar so illa, at hesin koyrdi út av vegnum, fekk dómin staðfestan í Eystara Landsrætti.**

Leo Poulsen

Tað var mánanáttina 17. mai í fjør, at ein bilur koyrdi út av vegnum millum rundkoyringina og Effo-støðina í Kollfjarðadali. Tá løgreglan kom á staðið, lá bilurin á síðuni við síðuna av vegnum.

Ein løgreglumaðurin greiddi í Eystara Landsrætti frá, at tá hann kom á staðið, tosaði hann við eina kvinnu, sum segði seg hava koyrt bilin. Hon greiddi løgreglumanninum frá, at maður hennara, sum hevði sitið framman við síðuna av henni, hevði órógvað hana so mikið illa, at hon misti tamarhaldið á bilinum og rendi út av.

Men bæði í Føroya Rætti og í Landsrættinum segði hon seg ikki hava ánilsi av, hví hon hevði rent útav.

Hon hevði greitt løgregluni frá, at maðurin og ein vinmaður hansara høvdu ballast, og skuldu so til Havnar. Men tá tey komu fram, var alt afturlatið, og tey løgdu tí leiðina vestur eftir aftur. Miðskeiðis millum rundkoyringina og Effo-støðina rendi bilurin so sum nevnt útav.

Hon hevði greitt løgreglumanninum frá á staðnum, at maður hennara hevði sitið og veipað við ørmunum, tikið í róðrið, flutt automatisku gearini aftur og fram og prikað hana, meðan hon koyrdi, og at hetta hevði ført til, at hon misti tamarhaldið á bilinum og rendi útav.

Í Eystara Landsrætti í gjár vildi hon tó vera við, at hetta mest var á veg suður til Havnar, og at hetta ikki var orsøkin til, at hon koyrdi út av vegnum.

## Fullir menn

Ákærdi maðurin var farin umborð á skipið, hann siglir við, og har var fløskan komin á borðið. Ákærdi metti, at hann mundi hava drukkið eina heila vodkafløsku gjøgnum kvøldið.

Hann ringdi fleiri ferðir til konuna at fáa hana at koyra seg og ein vinmann til Havnar. Konan fór tí eftir teimum báðum, og koyrdi teir til Havnar.

Sum nevnt var alt læst, tá tey komu til Havnar og vendu tí við aftur. Tá løgreglan avhoyrdi mannin á Landssjúkrahúsinum, pástóð hann, at hann hevði koyrt bilin. Sostatt søgdu bæði maður og kona seg at hava koyrt.

Frá vinmaninum fekst eingin hjálp, tí hann segði seg hava ligið avdotnan á baksetrinum.

Tað var tó semja um hjá ákæra og verja, at tað var konan, sum koyrdi. Hetta, hóast hon als ikki hevði koyrikort.

Meðan konan hevði sitið í trygdarbelti, gjørdi maðurin tað ikki. Orsøkin var, segði konan, at hann fekk ikki sitið í trygdarbelti orsakað av einum skaða í rygginum.

Við óhappið fekk maðurin skaða í fótliðin, og fyri løgreglumanninum tóktist tað, sum var fóturin brotin. Men hetta mintist konan einki til.

## Staðfestu dómin

Ákærdi maðurin segði í Føroya Rætti, at hann lítið og einki mintist til hendingina, bara tað, at hann var farin umborð á skipið at ballast og at hann hevði helst drukkið eina heila fløsku av vodka.

Hann er sjómaður sjálvur og er úti í løtuni, men bæði hann og konan og ákæri og verji góðtóku, at málið varð avgreitt uttan at ákærdi var til staðar.

Konan var førd sum vitni í landsrættinum, saman við løgreglumanninum.

Ákærin segði í sínari proceduru, at tað mátti roknast sum prógvfast, at tað var konan, sum førdi bilin. Hann segði eisini, at einasta skilagóða frágreiðing fyri, at konan rendi út av einum breiðum og beinum vegi var, so sum konan upprunaliga hevði greitt løgreglumanninum frá, at maðurin við sínum atburði hevði órógvað hana so mikið, at hon misti tamarhald á bilinum.

Verjin hinvegin helt upp á, at tað als ikki var prógvað, at maðurin hevði uppført seg so, sum ákæruvaldið vildi vera við. At konan hevði sagt so fyri løgreglumanninum var einki prógv fyri, hvussu maðurin uppførdi seg beint undan, at bilurin rendi út av vegnum.

Verjin vísti eisini á, at hetta var um náttina, og at konan tí saktans kann hava verið troytt og ókonsentrerað eina løtu. Einki ítøkiligt var komið fram um, at ákærdi var beinleiðis orsøkin til óhappið.

Í Føroya Rætti varð maðurin dømdur 12.000 krónur og at missa koyrikortið í trý ár. Tann dómin staðfesti Eystari Landsrættur í gjár.

*Veitst tú eina søgu, send so SMS á 28 50 04*